## Ongland var eyðmýkt

Ensku fjølmiðlarnir fara illa við enska landsliðnum, eftir at liðið í gjárkvøldið tapti 2-0 ímóti Kroatia á útivølli. Kroatia var nógv tað betra liðið í dystinum, og í dag kalla fjølmiðlarnir tapið fyri pínligt og eyðmýkjandi.

Í hálvleikinum var st-ðan 0-0, men tíðliga í seinna hálvleiki kom Kroatia á odda 1-0. Og so stóð málmaðurin Paul Robinson fyri ein merkisverdum avriki. Gary Neville legði bóltin aftur til hann, og júst tá ið Robinson skuldi skjóta bóltin burtur, hoppi bólturin á óslættað vøllinum, fór upp um fótin hjá Robinson og í málið til 2-0, sum gjørdist úrslitið

## Einki mál til Jógvan Martin

Eftir fimm dystir sum venjari hjá føroyska landsliðnum, hevur tað ikki eydnast liðnum hjá Jógvani Martin Olsen at skora. Fyrsti dysturin hjá Føroyum við nýggja venjaranum var ímóti Pólandi, og tá taptu Føroyar 4-0. Síðani hava fýra dystir verið í EM-undankappingini, og her hevur heldur ikki eydnast føroyska liðnum at gera mál. Fyrstu tapini vóru 0-6 ímóti Georgia og Skotlandi. So kom 0-1 tapið fyri Litava, og í gjárkvøldið gjørdist tað til 0-5. Samanlagt 0-18 í fýra EM-dystum í ár.



# ...agunum



*Fraklendingar høvdu føroyingarnar á knøunum ein stóran part av dystinum, men tað var ikki fyrr enn seinasta korterið at heiðurliga tapið gjørdist til stórtap*

*Mynd: Scanpix*

løtu var líkt til, at vit skuldu sleppa heim við einum meira enn heiðurligum 2-0 tapi.

### Tekniski førleikin

At tað so kortini ikki gekk, hevði fyrst og fremst tvær orsøkir. Tann fyrra var lýtaleysa franska positiónsspælið, sum so við og við mergseyg føroysku spælarnar, sum valla orkaðu at flyta seg at enda. Hóast ferðin ikki var so stór, sum vit onkra tíð hava sæð hana, so varð bólturin koyrdur úr borði í borð, tá fraklendingar høvdu bóltin. Tað gav hópin av longu renningum hjá føroyska miðvøllinum, sum bakkaði nakrar sentimetrar fyri hvørt minutt, sum spælt varð.

Tekniski førleikin í franska spælinum var snøgt sagt ein fragd at síggja fyri tað nógva. Sendingarnar vóru millimetur neyvar. Malouda og Ribery tóktist toga síðulinjurnar við sær í royndini at gera vøllin breiðan, og av og á sóust snaringar, temjingar ella fintur, sum veruliga trokaðu seg at heimsklassa. Og so kann leggjast afturat, tað ikki var vantandi arbeiðssemi frá okkara, sum gjørdi, at talan bert varð um eitt gult kort. Snøgt sagt, so varð bólturin fluttur somikið nógv, at okkara sjáldan komu nóg nær eini tackling.

Hin orsøkin var, at franski venjarin við hálvum tíma eftir valdi at senda Nikolas Anelka og David Trezeguet á vøllin fyri ávíkvist Thierry Henry og Louis Saha. Anelka hevur í nógvar mátar verið ein enfant terrible í fronskum fótbólti, og tí hava landsliðskjansir hansara ikki verið eins nógvir, sum framúr fótbóltsevnini annars borga fyri. Og Trezeguet varð beinleiðis avsettur eftir dystin móti Skotlandi, har venjarin metti hann skapa ov lítið.

Heldur enn at leita í djúpu tómrúmini, sum føroyska verjan fekk lukkað alt meira, tóku teir báðir nýggju spælararnir nógv meira lut í spælinum. Tað gav aftur fleiri renningar til okkar verjuspælarar, og í longdini megnaðu teir ikki at standa fyri trýstinum. Anelka einaferð – eftir upplegg frá Trezeguet – og Trezeguet tvær ferðir syrgdu fyri, at tapið varð av tí dyggara slagnum, og tað kunnu hvørki føroysku spælararnir – ella áskoðararnir – seta stórvegis fingramerki á.

### Liðið skal mennast

Ein av høvuðsboðskapunum hjá Jógvani Martin Olsen, síðani hann tók við sum venjari, hevur verið, at hetta landsliðið skal hava tíð at mennast. At liðið í fyrstu fýra undankappingardystunum hevur tapt til samans 18 mál er sjálvandi ikki besta útgangsstøðið. Men heilt realistiskt, so skulu Føroyar neyvan rokna við, at fótbóltslandslið okkara hevur stórvegis møguleika at koma úr Fraklandi við einum munandi frægari úrsliti. Fyri einum ári síðani sóu vit eitt føroyskt lið, sum hevði munandi drúgvari royndir , prísa sær – og serliga Jákupi Mikkelsen – lukkuliga fyri, at tapið bara varð 3-0 í Lens, og tí vil fyrsti setningurin í slíkum dysti vera at læra.

Og verður lærdómurin brúktur rætt, so er einki at ivast í, at læran kann vera bæði rík og góð úr slíkari uppgávu. Fyrst og fremst, so gevur bara tað at luttaka í slíkari uppgávu meira "hár á bringuna" hjá einstaka spælaranum. Truplari enn tað sama verður tað neyvan – útidysturin móti Italia undantikið!. Og hartil er tað við til at hvessa hvønn einasta spælara. Teir ikki bara síggja, men kenna á egnum kroppi, hvussu styrkin og førleikin er, tá spælt verður á hægsta stigi, og tær royndirnar eru nakað, sum liðið við tíðini kemur at byggja á. Og verður tosað um royndir, so er bert ein háttur at fáa hesar. Dystir skulu til – nógvir av slagnum – og í so máta var ferðin til Sochaux enn ein partur av menningarætlanini. Og við mótstøðuni í huga, so skal hetta tapið altso ikki sammetast við tey, sum liðið var fyri móti ávíkavist Georgia og Skotlandi!

## Trupult undir øllum umstøðum

**(Sochaux, Frakland):** Síðani leygardagin hevur Kári Nielsen verið í einum slag av bíðistøðu. Bíðistøðu, tí tað eftir dystin móti Litava stóð greitt, at hann í løtuni er triða val til tey bæði sentralu miðvallarplássini, men at Pauli G. Hansen samstundis var sera ivasamur.

Tað gekk heldur ikki hjá Paula at gjøgnumføra dystin, og tí mátti Kári taka til takkar við truplu uppgávuni sum innskiftari.

- Hatta var sjálvandi ein øgiliga trupult dystur at koma inn í. Men hinvegin ivist eg í, hvussu nógv lættari tað hevði verið, um eg var við frá byrjan. Men eg haldi, at vit megnaðu væl at halda okkara avtalur. Sjálvandi er tað keðiligt, at teir skora hasi trý seinastu málini, men alt í alt fingu vit illa gjørt tingini øðrvísi, helt Kári eftir dystin.

## Lærdu nakað í Skotlandi

**(Sochaux, Frakland):** Fyrst og fremst, so vóru tað stigini, sum tað snúi seg um hjá franska landsliðsvenjaranum. Raymond Domenech tóktist vera væl nøgdur um, at hansara menn høvdu vunnið dystin móti Føroyum, og so ongantíð betri, enn at talan var um tryggan sigur, har hvørki kort ella skaðar settu dagsskránna.

- Vit lærdu okkara lektión í Skotlandi. Hesa ferð spældu vit soleiðis, sum tú eigur at spæla móti einum liði, sum leggur dentin á verjuspæl, og tað eri eg nøgdur um. Men tað er púrasta givið, at mær hevði dámt betri, um vit eisini høvdu spælt á hendan hátt móti Skotlandi, staðfesti venjarin.